## 1964

10 mánaðir áðrenn Victor Danielsen andaðist, byrjaði hann at skriva eina kristiliga grein eina ferð um vikuna í blaðnum »14. september«. Hesar greinar vórðu síðani savnaðar í bókina »Frelsari mín«, sum kom út hetta árið

## 1973

Bíblian hjá Victor var endurskoðað hetta árið

## 1979

Skaldsøguna »Hin trúfasti lovarin«, sum VD týddi úr donskum eftir J. R. Cacduff í 1923, kemur útaftur undir heitinum »Gud er trúgvur«

## 1994

»Fra vantroen til Kristus«, sum Victor Danielsen týddi úr enskum til danskt í 1926, kemur út í føroyskari týðing »Frá vantrúgv til Kristus« í týðing eftir Richard Danielsen

fóru av Klaksvíkini, minnist Jógvan Gerðalíð aftur á.

Sendiboðið lá innast á vánni, og tá teir løgdu frá landi sigldu teir spakuliga úteftir og tóku so »manningina« umborð, bæði menn og kvinnur sum øll brendu fyri tí sama, - at fólk á smáplássunum skuldu fáa møguleika at hoyra gleðiboðskapin.

Um hesa tíðina í 40'unum og heilt fram til seinnapartin í 50'unum var ikki so gott vegasamband, og tá tað ikki hendi tað stóra á smáplássunum, var tað ein stórhending at fáa vitjan av manningini í Sendiboðnum.

- Tað vísti seg í roynd og veru at vera óneyðugt at boða frá at vit komu til bygdina. Fólk sóu eyðkenda bátin koma stimandi inn móti bygdini, og so savnaðust tey saman við okkum.

- Vit plagdu onkutíð at senda onkran runt í húsini at boða frá møtinum, og so byrjaði møtið stutt eftir, greiðir Jógvan Gerðalíð frá.



*- Tað vísti seg í roynd og veru at vera óneyðugt at boða frá at vit komu til bygdina, sigur Jógvan Gerðalíð, sum her lesur úr dagbókini fyri sendiboðið*

# 22 fundir í 16 bygdum

Á ferðunum við »Sendiboðinum« var stórur dentur lagdur á at føra dagbók.

Greiðar reglur vóru fyri, hvussu henda skuldi førast, og í dag vitna hesar frásagnir um tað ótrúliga stóra virksemið og tey túsundtals fólkini, sum vóru til hesi møtini á teim støðum, har atkomandi var.

Eitt brot úr hesi hondskrivaðu dagbókini ljóðar soleiðis:

Mikudagur 28. juli 1948

Fóru av Eiði klokkan 11.50. Fyri Risanum møttu vit Vón, sum skuldi til Eiðis eftir fólki og síðani til Íslands.

Komu til Gjáar kl. 13:15. Høvdu fund har kl. 14:15. 90 fólk.

Fóru frá Gjógv kl. 15.05 eftir at hava telefonerað til Eiðis og Fuglafjarðar, og eisini sent fundarboð í Funningsfirði og Elduvík. Kl. 16:35 løgdu at í Funningsfirði og hildu fund kl. 16:50. 21 fólk.

Fóru úr Funningsfirði kl. 18:25. Løgdu at í Elduvík kl. 19:10. Hildu møti har kl. 19:45. 25 fólk. Fóru úr Elduvík kl. 21:00. Settu Victor Danielsen og Martin Hansen av í Fuglafirði kl. 22:35 og síðani hildu Jógvan Tróndheim, John Høj og Líggjas Hansen ferðina fram til Klaksvíkar, hagar teir komu kl. 0:15.

So er í Harran navni henda ferð at enda. Vit hava havt bátin í 9 dagar, hildið 22 fundir í 16 bygdum og havt úti við 700 áhoyrarar.

# 1150 fólk lýddu á

Eitt annað dømi úr virðismiklu dagbókini er frá juli mánaði 1950:

"Vit hava siglt frá mánadegi 17.7 til sunnudagin 30.7 í 14 dagar og hava havt 39 fundir í 35 bygdum og støðum. Áhoyraratalið er ætlað til at hava verið um 1150"

## *Søguna sig mær um Jesus*

*Søguna sig mær um Jesus,*
*orðið at hjarta mær før,*
*sig mær ta søgu so dýra,*
*boðskapin besta á jørð!*
*Songin, sum hirðarnir hoyrdu,*
*songin um frøi og frið,*
*songin um heiður til Harran,*
*lat okkum syngja hann við!*

Niðurlag:
*Søguna sig mær um Jesus,*
*orðið at hjarta mær før,*
*sig mær ta søgu so dýra,*
*boðskapin besta á jørð!*

*2. Eina í oyðimørk varð hann*
*freistaður ferð eftir ferð; 1)*
*hørð vóru fíggindans álop,*
*tó, síggj, hann sigrandi er!*
*Sig frá hans sút og hans sorgum,*
*syng um hans sveitta og stríð!*
*Vanvirdur, einsamur, armur*
*var hann í bygd og í bý.*

*3. Sig frá teim tímum so tungum,*
*tá ið á trænum hann hekk,*
*syng um hans sigur so stóran,*
*tá hann av grøvini gekk!*
*Kærleik her stóran eg síggi,*
*størri, enn áður eg sá,*
*kærleik, ið loysti tær leinkjur,*
*har ið eg trælbundin lá.*

1) Matt. 4,1-11
Fanny Crosby
(Victor Danielsen týddi)

*»Tað er ivaleyst, at øll, ið lesa hesar sálmar, vilja sanna, at teir eru lættir at skilja, og eg haldi ikki, at nakar av røttum kann finnast at tí málsliga búnanum, sálmarnir eru klæddir í. Málið er yvirhøvur gott og fellur væl og natturliga og hóskar eisini væl til innihaldið, ið er einfalt og fábroytt. Sálmar sum hesir, ið eru týddir við skaldsligum hegni, vilja altíð ganga av hjartanum«*

(M. A. Jacobsen)